

# Føroysk oljufyritøka seld útlendskum oljurisa

**Jan Müller**

27.02.2014 - 14:02

Oljan.fo

Schlumberger hevur í dag keypt føroysku KT-fyritøkuna Simprentis og lærisimuleringina OilSim frá p/f Tøkni, sum Ólavur Ellefsen stovnaði og sum hann eigur saman við Framtaksgrunni Føroya, Royndini og øðrum íleggjarum.

OilSim var upprunaliga partur av førleikamenningini hjá Jarðfeingi og Eni, og hevur síðani verið nýtt í útbúgving og venjing um allan heim.

Schlumberger hevur í fleiri ár brúkt OilSim bæði til innanhýsis og uttanhýsis skeið og førleikamenning, og bjóðaði sær nú til at keypa Simprentis og OilSim fyri at styrkja um teirra støðu á skeiðsmarknaðinum.

Flestu starvsfólkini í p/f Tøkni eru nú farin í starv hjá Schlumberger, og leiðslan og menningin av OilSim fer framhaldandi at vera í Føroyum hjá Schlumberger. Ólavur Ellefsen heldur fram sum leiðari og Julius Biskopstø, sum hevur staðið á odda fyri

menningini av OilSim síðani 2005, fer eisini at standa á odda fyri menningini av nýggju útgávuni, OilSim 4.

P/f Tøkni fer frameftir at menna eina fiskivinnusimulering eftir sama leisti sum OilSim.

Nevndarformaður frá byrjan hevur verið Ólavur Gregersen, og hann vísir á, at sólskinssøgan Simprentis við hesum prógvar, at til ber at fáa nýskapan til høldar í Føroyum - eisini fyri eina fyritøku, sum einamest selur til altjóða marknaðin. Samstundis er hetta eitt dømi um gagnið av tolnari og váðafúsari føroyskari fígging, sum í síðsta enda hevur fingið gott avkast av íløguni.

Schlumberger veitir tænastur til oljuídnaðin, er skrásett á New York Stock Exchange og hevur millum annað veitt tænastur í sambandi við leitiboringar á føroyska landgrunninum.